– trygt og ómakaleyst til hús

INNI



# Ein heilt sjáldsom »liebhavaraogn« í Havn

**Tú trýrt neyvan tínum egnu eygum, tá ið tú sært fantastiska útsýnið yvir alla Havnina, og húsini eru heilt einastandandi til "beligginheit", arkitektur, tilfar og handverk. Her gongur alt upp í eina hæðri eind.**









## Fyrsta fatanin

Tú koyrir inn í túnið, ið alt er laðað, steinsett og lagt við asfalt. Tú kanst ganga runt øll húsini, og alt er lætt at halda. Eingin trupulleiki er at seta bilin, tí nóg mikið er av plássi. Tú fært straks eina fatan av, at her er alt væl hugsað ígjøgnum til eina frálíka heild. Sjálvvirkandi garaguhurðin fer upp, og tú koyrir inn í snøggu garaguna. Bilhúsið er sera snøgt, og har er pláss til at arbeiða og fjasast við mangt og hvat til ítriv. Tú kanst ganga beint inn í hjallin, ella inn í grovkøkin og víðari inn í húsið.

## Ljós og luft – stílur og snið

Stóru panoramavindeyguni geva tær eitt einastandandi útsýni yvir alla Havnina, og tú kennir teg sum eitt við umhvørvið og við stóru verð, ið liggur har úti í sjónarringinum, ið tú sært nærum allan. Rúmini hanga væl saman og felagsrúmini venda øll móti útsýninum. Trivnaðurin og er settur í hásætið, og húsini eru sera livilig. Alt er nýtt, ljóst og lekkurt og gjørt úr besta tilfari og við besta handverki. Her er einki at koma eftir. Tað er sjáldsamt, at alt er so fullfíggja. Veggirnir eru hvítir og gólvini úr kirsuberjatræi.

## Inni og úti

Í niðaru hædd er inngongd, durur / gongd / hall, baðirúm, 4 stór kømur, stova / borðsstova / alrúm / køkur við útgongd til útigólv / terassu, grovkøkur / bryggers / vaskirúm við útgongd til garagu og hjall, klædnarúm, hjúnarrúm og baðirúm. Í ovastu hædd er trappugongd, stór útsýnisstova og 2 kømur. Snøggur garður / urtagarður er uttanum. Húsini standa í friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg nær miðbýnum í Havn. Heilt einastandi panoramaútsýni er yvir alla Havnina, Nólsoynna og allan fjørðin.

## Fakta

**Adressa** ...........Írarók 12, Tórshavn
**Byggiár:** ...........2006
**Hæddir:**............2
**Gólvvídd:**..........270 m²
**Grundøki:**.........701 m²
**Hjallur:** .............Ja
**Bilhús:**..............Ja
**Prísuppskot:** ...Hóskandi boð









PF inni
Niels Finsensgøta 37
Postboks 364
FO-110 Tórshavn
Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**